# Órógvast ikki av festivalinum

**Nógvur gangur stendst ofta av festivalum og at nógv fólk samlast á einum stað. Men grannarnir at Kelduni lata væl at, og siga at teir órógvast ikki av ganginum, heldur tvørturímóti, tey halda tað er sera hugnaligt**

FJARÐAFESTIVALUR 08
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



**– Hóast gangurin er nógvur av stóra pallinum inni í Kelduni, hoyrist ikki serliga nógv útum sjálva bygningin, sigur Jóan Pauli Joensen**

Tá desibellini fara at runga út úr stóra og nýmótans annlegginum í Kelduni vikuskiftið 29.- 31. august, verður kanska torført at fáa orðið upp inni í Kelduni sjálvari og á økinum beint uttanfyri. Men hetta órógvar ikki grannarnar, sum búgva tætt uppat Kelduni og festivaløkinum.

- Heldur tvørturímóti. Tað er sera hugnaligt her meðan festivalurin er, og serliga um tað eydnast væl við veðrinum. Vit klaga ikki um gangin, og so er tað bert yvir eitt vikuskiftið, so tað er uttan iva til at liva við. Tað er eisini sera hugnaligt, at nógv fólk, sum man kennir, koma á gátt, og serliga um tað eydnast væl við veðrinum, sigur Jóan Pauli Joensen, nærmasti granni at Fjarðafestivalinum.

## Hoyrist ikki nógv

Hóast gangurin er nógvur av stóra pallinum inni í Kelduni, hoyrist ikki serliga nógv útum sjálva bygningin. Hetta merkir at grannarnir av festivalinum ikki verða órógvaðir serliga nógv av ganginum, og tað sindri av ljóði, sum hoyrist útum og frá pallunum uttanfyri Kelduna, er ikki nakað, ið grannarnir taka illa upp.

Fólkini í Skálabotni gleðast heldur um at lív er í økinum hesar dagarnar og at nógv fólk velja at koma saman til henda kristna festivalin, har bæði tónleikur og boðskapur eru í hásæti.

- Tað ger ikki mun, um tað ljóðar eitt sindur. Eg fái væl svoið fyri larminum, hóast tað ikki er ætlanin, tí eg plagi sjálvur at vera í Kelduni og á festivalinum hesar dagarnar, sigur Jóan Pauli Joensen.

Jóan Pauli Joensen og flestu fólkini har í økinum plaga at rætta eina hjálpandi hond. Hann er sjálvur ein av teimum, ið hava hjálpt til við at byggja Kelduna upp, og tey flestu í Skálabotni munnu vera glað um at Keldan er komin hagar at verða.

Uttan iva munnu tey flestu í Skálabotni eisini fara ein túr inn á festivaløkið og njóta tónleikin og lívið í økinum.

## Vóna veðrið verður gott

Árið í fjør eydnaðist einki serliga væl, veðrið var sera ringt og í løtum stóð á hjá fyrireikarunum at halda festivalin koyrandi. Nógvur vindur var og teltini vóru um at fara á flog, og stóðu og flákraðu og ristust í vindinum.

Tað, sum tey flestu munnu tosa um hesar dagarnar í Skálabotni, er um hvørt veðrið man fara at halda sær ella ikki.

- Veðrið hevur ótrúliga nógv at siga. Føroyingar eru soleiðis, at teir keypa ikki atgongumerki fyrr enn við dyrnar, tá tey eru sikkur í, hvussu veðrið er. Ikki fyrr sama dagin gera tey av, um tey vilja fara ella ikki. So sjálvandi vóna vit at veðrið verður gott, soleiðis at nógv fólk koma, staðfestir Jóan Pauli Joensen, at enda.

Stórt úrval Góð tænasta www.flisan.fo





Kom og vitja okkum í nýggju hølum okkara á Lýðarsvegi 2 í Hoyvík

Vit ynskja øllum ein góðan Fjarðafestival



Vit hava flísar bæði til innandura og uttandura.

Vit hava landsins størsta úrval av flísum til bað, køk, gólv, tún og trappur.

Vit veita fegin ráðgeving um val av flísum og álegging, og ávísa áleggjara til smærri uppgávur.

Flísan
Lýðarsvegur 2
Hoyvík
tel 31 80 98
faks 31 64 86
far 51 80 98
flisan@kallnet.fo

www.demich.fo

HITI · VENTILATIÓN · SANITET

Vit ynskja øllum ein góðan Fjarðafestival!

Okkara dygd – tín trygd!

Demich P/F
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311
demich@demich.fo





demich

VÁGUR RUNAVÍK TÓRSHAVN